# Kundi verið heilt javnt

**Hevði Hans Pauli Samuelsen ikki skotið mál við seinasta sparkinum suðuri í Vági, høvdu B36 og KÍ skapt fordømi í føroyskari fótbóltssøgu**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*



*KÍ og B36 vóru bert sekund frá at koma í eina støðu, har tað vildi verið neyðugt við antin umdystir ella lutakasti fyri at gera av, hvør teirra skuldi halda fram í steypakappingini*

Lummaroknararnir mundu vera dúgliga á lofti, tá seinast umfarið í bólkaspælinum í kappingini um Løgmanssteypið varð leikt annan páskadag.

Sum tað verður nevnt aðra staðni á hesum síðum, so førdu skiftandi støðurnar alla tíðina til, at tað vóru ymisk lið, sum vóru úti úr kappingini, men leingi var tað tó so, at eingin av trý'arunum var heilt úti.

Fór seinasta sparkið hjá Hans Paula Samuelsen í dystinum millum VB og EB/Streymn ikki inn, hevði støðan nevnliga verið tann, at bæði KÍ og B36 høvdu verið nummar trý í sínum bólki. Bæði høvduavt 10 stig fyri sínar seks dystir, og bæði høvdu havt málmunin 11-8.

Kappingarreglurnar hjá FSF siga, at fyrst verður talt eftir stigum, síðani eftir innanhýsis dystum (sum sjálvandi ikki eru aktuellir her), síðani eftir málmuni og at enda eftir skoraðum málum.

Alla staðni her verður støðan tó tann sama, og sambært Ísak Mikladal hevur FSF ikki frammanundan gjørt av, hvussu farast skal fram í slíkum føri.

Í landskappingini eru reglurnar annars, at talan í evsta føri verður um umdyst á uttanveltaðum vølli, og Ísak Mikladal viðgongur eisini, at tað ivaleyst vildi verið besta ítróttarliga loysnin, men sum sagt, so hevði FSF ikki tikið støðu til hetta frammanundan.

- Hevði tað hent, so máttu vit sjálvandi tikið støðu, og har eru so bara tvey í at velja. Antin lutakast ella umdyst, og ítróttarliga vildi umdysturin sum sagt verið tann rættasti.

Hvussu var og ikki, so kundi hetta kortini gera tað sama. Vágbingar mistu í evstu løtu, og tí gjørdist KÍ nummar tvey í sínum bólki, og skuldu teir tí ikki roknast við, tá serstaki trý'ara roknskapurin skuldi gerast upp.

## Kasakstan eru klárir

Í seinastu viku nevndu vit, at tað møguliga bleiv so, at landsliðið hjá Kasakstan ikki fekk komið til Føroya, tí øll tey neyðugu pappírini oftani kundu verða tung at avgreiða.

Nú tykist tó, sum um allir hesir trupulleikar brádliga eru loystir.

Ísak Mikladal, aðalskrivari hjá FSF, sigur, at Fótbóltssambandið nú hevur móttikið ein lista við teimum 31 fólkunum, sum eru í ferðalagnum hjá Kasakstan, og sum hann málber seg, so eru tað aðrir og smærri trupulleikar, sum nú verða umrøddir.

- Tað seinasta vit hava tosað um er, hvussu støddin á flagginum hjá teimum skal vera, so tað sær í øllum førum út til, at alt er um at koma í rættlag.

Føroya landsliðið verður ikki savnað fyrr enn leygardagin. Fyrri dysturin móti Kasakstan verður sunnudagin komandi á Svangaskarði, og verður hesin leiktur klokkan 16.00. Seinni dysturin verður á Tórsvølli, og verður hesin leiktur týsdagin kl. 18.45

**-jm**








# Hjalgrím hevur ofta staðið andlit til andlit við Kahn

**Minnisríkasta eygnabragdið í landsliðshøpi í fjør var, tá ið Hjalgrím Elttør hevði møguleika at javna til 2–2 ímóti Oliver Kahn og Týsklandi. Høvuðspersónurin, sum gleðir seg til nýggjar møguleikar á landsliðnum, hevur ofta spælt støðuna í Hannover av í huganum, og hann vónar at fáa møguleikan aftur, tá ið týskarar koma henda vegin**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Leygardagin 29. mars fór tað sum eldur kring fótbóltsheimin, at Litava hevði megnað 1–1 ímóti týsku varaheimsmeistarunum. Fótbóltshugaðir føroyingar, sum síðani hava sæð tindarnar frá tí dystinum í sjónvarpinum, hava sjálvsagt hugsað aftur á mikudagin 16. oktober í fjør, tá ið Føroyar taptu 2–1 í Hannover. Og í tí sambandinum er tað skjótt, at støðan rennur fram í hugan, tá ið Hjalgrím Elttør dygst undan leikloki var einsamallur við týska málverjanum, men tíverri tók bólturin í stólpan og fór ikki í málið.

– Eg havi ofta sæð hasa støðuna aftur í føroyska sjónvarpinum og eisini í útlendskum sjónvarpsrásum. Og sjálvandi iðri eg meg um, at bólturin ikki fór í málið. Eg kendi tað ikki soleiðis tá, at bólturin bar seg eitt sindur undarliga at. Men á sjónvarpsmyndunum tykist tað sum um, at tað er orsøkin til, at eg ikki raki bóltin heilt reint.

Vit hava sett manninum stevnu, sum hesa síðstu løtuna í Hannover hevði møguleikan at vera orsøk til kanska størstu sensatiónina í fótbóltssøguni yvirhøvur.

Kundi tú havt borið teg øðrvísi at í hasi støðuni?

– Hetta er ikki nakað, sum eg dag og dagliga gangi og hugsi um. Men sjálvandi havi eg hugsað um hatta og aftur nú, tá ið eg sá litavan skora ímóti Kahn. Støðan var ikki so nógv øðrvísi enn tann, sum eg var í. Hann sendi bóltin í mótsattu síðuna av tí, sum eg gjørdi, og hann var heppin. Eg haldi, at eg gjørdi rætt, tí Kahn var farin eitt sindur til høgru fyri seg sjálvan, men eg var bara óheppin, at bólturin fór í stólpan og ikki í málið.

Hvat kundi tú havt gjørt øðrvísi?

– Aftaná havi eg hugsað, um eg kundi havt drigið meiri inn fyri Jeremis, sum var aftanfyri, og so kanska fari til høgru fyri meg sjálvan og framvið Kahn. Tað hevði ivaleyst havt við sær, at vit høvdu havt fingið brotsspark, um eg ikki hevði havt skorað. Akkurát hatta gerst ikki umaftur. Jeremis og eg býttu um troyggju. Tað er minnið, sum eg havi frá hasum dystinum, og so mugu vit vóna, at tað fer at eydnast betri, tá ið týskararnir koma henda vegin.

### Stór kapping

Hjalgrím Elttør sigur seg ikki duga heilt at siga, um hann fer at fáa møguleikan, tá ið Týskland 11. juni kemur henda vegin. Men hann stríðist fyri møguleikanum:

– Í fjør var eg við í fýra landsdystum. Ímóti Skotlandi var eg millum teir fyrstu ellivu, meðan eg kom inn í vinardystunum ímóti Póllandi og Liktinstein á Kypros og ímóti Týsklandi, tá ið eg spældi einar tjúgu minuttir. Sjálvandi heldur landsliðsvenjarin seg til sínar spælarar. Men mín fatan er, at nýggi venjarin lurtar nógv eftir hjálparvenjaranum, sum fylgir sera væl við, hvussu spælararnir í heimligu kappingini standa seg, og serliga hvussu støðugir teir eru. Hetta síðsta verður gingið nógv uppí. Tí er tað sera týdningarmikið at standa seg væl í heimligu kappingini, um hugsningur skal vera um at koma nærri landsliðnum.

Hvussu nær ert tú teimum fyrstu ellivu?

– Tað dugi eg ikki at siga, og tað veit eingin so tíðliga á árinum. Í fjør var eg fegin um at fáa boð. Tað vóni eg, at eg fari at fáa í ár, og nú er málið at sleppa á liðið. Men kappingin er sera stór. Á framrættaðu plássunum er eingin púra upplagdur og framum hinar eyðsýndur kandidatur, soleiðis sum tað var, tá ið Todi Jónsson var á liðnum. Spurningurin er eisini, hvussu tað verður við Toda og øðrum útisetum, grundar Hjalgrím Elttør.

Vit kunnu ímynda okkum, at tað, sum Hjalgrím hevur í huganum, er, um nú Christian Høgni Jacobsen framvegis er álopsspælari á landsliðnum, sjálvt um hann er verjuspælari í Vejle, og hvussu tað verður við Claus Bech Jørgensen, ið tað aftur nú hevur verið tosað um sum møguligan føroyskan landsliðsspælara.

– Eg haldi eisini, at venjararnir tað síðsta árið hava givið greiðar ábendingar um, at teir rokna fleiri at vera tætt at landsliðnum, enn tað kanska hevur sæð út áður. Fleiri ungir spælarar hava verið við í venjingum og á venjingarleg-um, og eg haldi, at tað er heilt natúrligt, um fleiri koma upp í part av okkum, sum í fleiri ár hava spælt saman á yngru landsliðunum. Men sjálvandi er hetta nakað, sum ikki gongur fyri seg frá einum degi og til tann næsta, so tað ræður um at vera tolin.

### Dreymurin

Hjalgrím Elttør hevur onkra ferðina verið uttanlands og royndarvant – bæði í Onglandi og Fraklandi. Hjalgrím dylur ikki, at hann framvegis droymir um, at dreingjadreymurin, at gera fótbóltin til livibreyð, skal gerast veruleiki. Men tað er torført, og hepni skal til.

– Akkurát nú havi eg ikki hug at tosa um ítøkiligar møguleikar. Einki kemur av sær sjálvum. Tú skalt gera nógv við fótbóltin hvønn einasta dag, um tú skalt verða førur fyri at gera munin, tá ið møguleikin kemur. Landsliðið fær fleiri stórar møguleikar í ár. Vit skulu spæla í Íslandi og Skotlandi, og vit fáa vitjan úr Íslandi, Litava og Týsklandi. Tað hevði ikki verið so galið aftur at fingið møguleikan at staðið andlit til andlit við Kahn. Um tað hevði eydnast at fingið bóltin framvið honum og ikki í stólpan, men í málið, so høvdu møguleikarnir at gera dreingjadreymin til veruleika vaksið. So tað ræður um at gera nógv við tað í venjing og dysti, sigur Hjalgrím Elttør, áðrenn hann smoyggir seg í bláu fótbóltsklæðini og fer út í apríl veðrið at venja saman við hinum klaksvíkingunum.